


# Kórfløga upptikin í Landskrona

Tað eu ikki bert fótbóltsævintýr, sum gerast veruleiki í svenska býnum Landskrona.

Nú er ein fløga útgivin við Tórshavnar Kamarkóri, og upptøkurnar eru gjørdar í Sofia Albertina Kirkjuni í Landskrona.

Tað er plátufelagið Tutl, sum gevur fløguna út, og á fløguni eru 15 skeringar.

Tórshavnar kamarkór varð stovnað í 1985, og hevur 25 sangarar. Kórið hevur tvær afturvendandi framførslur, eina jólakonsert og eina várkonsert, umframt aðrar kóruppgávur.

Í Tórshavnar Kamarkóri verður dentur lagdur á at framføra norðurlendskt tilfar. Eisini framførir kórið sálmar og nýggjari føroyskt tilfar og smærri klassisk verk.

Á nýggju fløguni við kórinum eru 15 skeringar, og millum teirra eru fyrst og fremst verk av føroyskum tónlistafólkum.

Fløgan fæst til keyps kring alt landið.

**ek**




# Tvær jazzsuitur endurútgivnar

Plátufelagið Tutl hevur endurútgivið tvær jazzsuitur eftir Kristian Blak og Yggdrasil.

Talan er um *Heygar og Dreygar* og *The Four Towers*, sum av fyrsta tíð komu út í ávíkavist 1983 og 1985, og sum nú eru at finna á somu fløgu.

Tutl hevur seinastu árini givið nógvar av teimum gomlu plátunum og bondunum út á fløgu, og hendan seinasta fløgan er bert ein fløga í eini røð av mongum endurútgávum.

*The Four Towers* varð skrivað í 1985 upptikin í Havn sama ár. Á verkinum spæla bæði føroyskir og útlendskir tónleikarar, og millum teir kunnu nevnast Kristian Blak, Lennart Kullgren, Sharon Weiss og Anders Hagberg.

*Heygar og Dreygar* var skrivað, upptikin og útgivin í 1983, og tað er Kristian Blak, sum hevur skrivað. Fløgan varð upptikin í Danmark, og eins ov við *The Four Towers* er talan um jazz við einum serligum norðurlendskum ljóði.

Á *Heygar og Dreygar* eru tónleikararnir fimm í tali. Ernst Dalsgarð, Lennart Kullgren, Kristian Blak, Anders Jormin og Karin Korpelainen.

Nýggja fløgan fæst nú í sølubúðunum og kostar 129 krónur.

**ek**



Hákun Djurhuus, nýggi stjórin í P/F Føroya Shell, og nevndarformaðurin Jørn Webler. Mynd: Jens Kr. Vang

# – Vit skulu halda fast um somu meginreglur

– Føroya Shell er ein væl rikin fyritøka, sum skal førast víðari. Og vit fara í framtíðini at halda fast um somu meginreglur, sigur nýggi stjórin á Føroya Shell, Hákun Djurhuus

Frá 9. desember 1997 varð Hakun Djurhuus settur sum stjóri í P/F Føroya Shell. Hann tók við eftir Hjarnar Djurhuus, sum á móttøku fyri viku síðani, alment segði farvæl til heita sessin í oljufelagnum.

Men hóast Shell í Føroyum nú hevur fingið nýggjan stjóra, fer tað ikki at hava við sær kollveltandi broytingar í fyritøkuni.

– Shell er ein væl rikin fyritøka, sum skal førast víðari. Vit fara at halda fast um somu meginreglur, sum vit hava gjørt, og so skulu vit fyrihalda okkum til tær broytingar, sum fara at koma í framtíðini, sigur nýggi stjórin.

– Tað er ikki ein spurningur um at markera seg sjálvan persónliga, men at reka fyritøkuna á skilabesta hátt.

Umleið 65 fólk starvast í løtuni hjá P/F Føroya Shell, og tey starvast á bensinstøðunum, í tangabilatænastuni, oljufýrservicini, umsitingini og umborð á tangaskipini Magn. Høvuðsskrivstovan hjá fyritøkuni er á Viðarnesi í Havn.

**Royndir innan fiskivinnu fyrimunur**

Hákun Djurhuus fekk útbúgving sum sivilverkfrøðingur í 1986, síðani arbeiddi hann í ráðgevandi vinnuni í nøkur ár, áðrenn hann fór til Klaksvíkar at starvast hjá Northern Fish Cold Storage Ltd. Har var hann í trý ár, frá 1993 til 1996, og hann luttók eisini í leiðsluni á virkinum. Í 1996 fór hann í starv hjá Dansk Shell, og var har í eitt ár til hann nú hevur tikið við sum stjóri í Føroya Shell.

At nýggi Shell-stjórin hevur royndir innan fiskivinnuna heldur hann sjálvur verða ein fyrimunur.

– Stórur partur av okkara kundum eru skip og fiskavirki, og eg meti tað avgjørt vera ein fyrimunur, at eg havi starvast í fiskivinnuni og veit innanifrá, hvussu hon virkar. Eg lærdi nógv í míni tíð í Klaksvík, sum jú er fiskivinnumiðdepilin í landinum, og at eg eisini var við í leiðsluni í fyritøkuni gjørdi, at eg eisini fekk royndir á tí økinum, sigur Hákun Djurhuus.

Dansk Shell eigur meirilutan av partapeninginum í P/F Føroya Shell, og tað var ein góð byrjan hjá Hákuni Djurhuus, at hann kundi starvast í danska felagnum í eitt ár.

– Sjálvandi er nakað av muni millum Shell í Danmark og í Føroyum, men vit arbeiða innan somu rammur, og laga okkum so til viðurskiftini har vit eru. At eg starvaðist í Shell í Danmark gjørdi, at eg havi fingið viðkomandi royndir í einum størri oljufelag.

– Nýggja starvið hjá mær er ein spennandi avbjóðing, og eg kann lova at fyritøkan í framtíðini eisini fer at halda fast um somu meginreglur sum higartil, og tær broytingar, sum framtíðin fer at hava við sær, mugu vit so fyrihalda okkum til.

**ek**



Fráfarni stjórin Hjarnar Djurhuus saman við tveimum abbabørnum, tá stjóraskiftið á P/F Føroya Shell alment fór fram á móttøku fyri viku síðani